# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**46. partur**

Í seytjanda kapitli sær Jóhannes kvinnu, hin stóra skøkjan, hon situr á einum dýri. Hetta dýrið er identiskt við dýrið, sum vit sóu í trettanda kapitli, tað hevur tíggju horn og sjey høvd. Hesin kapitulin, tann seytjandi, sigur okkum, at høvdini eru sjey kongar. Fimm eru falnir, ein er, og hin er ikki komin enn. Vit vita frá Dánielsbók, at tað seinasta dýrið, sum Dániel sá, hevði tíggju horn, og at hetta var rómararíkið. Hetta dýrið hevur eisini tíggju horn At hetta eru somu tíggju hornini, er skilligt. Men hvønn umboða hesi sjey høvdini. Vers 9 sigur, at her ræður um vitið ið hevur vísdóm! – So her má ikki farast fram eftir fummum. Men við øllum fyrivarni og eymjúkleika kunnu vit royna at skilja, hvat tað er, sum stendur. Jóhannes fær her at vita , at av hesum sjey kongunum sum høvdini umboða, eru fimm falnir, ein er, og hin er ikki komin enn. Rómararíkið var enn, tá ið Jóhannes fekk hesar opinberingar. Hin er ikki komin enn, stendur. Dániel fekk at vita, at av Rómararíkinum skuldi eitt ríki stíga upp seinni. Hesi bæði ríkini eru sostatt nr. seks og sjey. Bábelsríkið, Medara og Persararíkið og Grikkalandsríkið eru nr.trí, fýra og fimm. Nr. eitt og tvey eru væl Egyptaland og Assýria. Um hetta er rætt skilt, síggja vit av hesum, at hetta dýrið ,við sjey høvdum og tíggju hornum, umboðar tilgongdina í heiminum heilt frá fyrstan tíð og til endan. Ein samling av teimum dýrunum, sum Dániel sá, og tey bæði, sum vóru framman undan, forna egyptalandsríkið og assýriskaríkið. Eisini síggja vit, at hetta dýrið er identiskt við djevulin, sum vit síggja í tóvta kapitli og við dýrið, sum kom upp úr havinum, í 13. kapitli. Hetta havi eg longu nevnt í 45. parti

Hetta samsvarar við tað, sum vit finna aðra staðni, at Djevulin er heimsins fúrsti. hann stendur aftanfyri alt tað illa í hesum heimi. Hann er tann, sum hevur givið dýrinum vald, sigur 13. kapitul. Hann villeiðir heimin. Hetta er so álvarsamt. Dánielsbók talar um høvdinga Grikkalands og høvdinga medara og persara, andamaktir í himmalrúminum. Dán. 10,13 og versini 19-20. Jesus sigur, at børn hansara eru ikki av hesum heimi, eins og hann er ikki av hesum heimi sjálvur. Paulus lærir, at tey trúgvandi eiga ikki at fara undir ójavnt ok saman við vantrúgvandi, og hann sigur m. a. hetta:" Hvat samljóð er millum Kristus og Belial. 2. Korintbr. 6,15. (Les alt sum stendur har)

Í Op. 13. kap. 3. versi stendur:

Eg sá eitt av høvdum tess eins og sært til deyða; men ólívssár tess varð grøtt. Og øll jørðin fylgdi undrandi eftir dýrinum.

Rómararíkið fall, men Dániel sigur okkum, at av rómararíkinum skal koma eitt ríki, deilt í tíggju kongar (hornini) og har kom eitt lítið horn upp , sum feldi tríggjar kongar ( Antikrist). Hetta var eitt deilt ríki, at líkna við leiður og jarn, sigur hann.

Opinberingin 17,11 - 14 sigur hetta:

Dýrið, sum var - og er ikki - er sjálvt hin áttandi og er eisini ein av hinum sjey - og fer burtur til fortaping.

Hini tíggju hornini, ið tú sást, eru tíggju kongar, sum ikki hava fingið kongadømi enn, men fáa vald sum kongar ein tíma - saman við dýrinum.

Teir hava allir sama sinni, og mátt sín og vald sítt geva teir dýrinum.

Hesir skulu berjast við lambið; men lambið skal sigra - tað og tey, sum við tí eru, hini kallaðu, útvaldu og trúføstu - tí tað er Harri harra og Kongur konga."

Ein óhugnalig framtíð hjá hesum heimi. Men tann, sum hevur tikið ímóti Kristusi sær fram ímóti einum betri staði tað er himmalskum. Hebr.br. 11,16.

Hvussu við tær. Eigur tú hesa vón ?

**Framhald**

# Barnið - um hugburð og fyrilit

DÁVID ISFELD



**Fosturtøka (1. partur)**

Um ein lóg skal gerast um fosturtøku, kunnu fólk ikki hugsa seg ov væl um. Tað er eingin orsøk til, at vit - fólkið - sita tigandi, meðan okkara politikarar einsamallir skulu taka støðu til eitt sovorið álvarsamt etiskt mál (ein undirsjóvartunnil fekk hóast alt nógv fólk úr sessinum, yvir um hav og oman á Tinganes). Eg meini, at vit skulu veita politikarunum vegleiðing, við at siga okkara hugsan alment - geva okkara innastu kenslum luft, lit og lív.

Kjakið um fosturtøku hevur vanliga tvey høvuðssjónarmið har annað tekur støði í barninum og hitt í mammuni. 1. partur í hesi greinarøð fer at snúgva seg um barnið, meðan kvinnan / mamman verður høvuðsevni í 2. parti. Í 3. parti verður okkurt skoytt upp í afturat við denti á sálina.

**Fostrið/barnið**

Tá tosað verður um fosturtøku, verður mest tosað um, nær fostrið er mett at vera ein menniskja - eitt mannabarn. Er tað tá eggið er gitið, ella í 6. viku, tá kroppslimir eru sjónligir og heilin er byrjaður at verða til, ella í 8. viku, tá fingrar og tær hava fingið skap og heilin aktiverar vøddar, ella í 12. viku tá tað týðiliga líkist einum mannabarni og kyn sæst. Hendan meting snýr seg um nær eitt fostur fær menniskja-status, og sostatt mannarættindi, m.a. rættin til lív; tí tá ber ikki til at fremja fosturtøku. Hendan meting snýr seg ikki um nær fostrið/barnið er livandi - nær talan er um lív.

Okkara definitión upp á lív er greið. Tað er tá ein kyknubýting er farin í gongd; og tann kyknubýtingin fer í gongd aftan á, at eggið er gitið. Talan er sostatt um lív, beinan vegin eggið er gitið. Men nær er tað ein menniskja? Her er tað, vit enn einaferð renna okkum inn í fosturstadiir sum nevnt omanfyri: er tað ein menniskja, um fostrið/ barnið hevur fingrar, aktivan heila, kynslutir o.s.fr. Um hetta er ein treyt fyri at hava menniskja status, og sostatt eisini rættin til at liva, so hava vit júst viðtikið eina definitión, hvørs treytir ein skal lúka fyri at vera ein menniskja, sum frátekur einum persóni í koma rættin til lívið; og frátekur, somuleiðis, eisini einum rørslutarnaðum persóni, ið manglar armar ella bein, rættin at liva, tí eftir omanfyrinevndu viðtøku eru tað bert heil menniskju, sum eru verulig menniskju við rætti til lív. So er tað bert ein spurningur um "ynski" hjá okkum "veruligu" menniskjum: ynskja vit viðkomandi at liva ella doyggja. Vit mugu ikki fara lættliga um slíkar definitiónir og viðtøkur.

Onkur segði einaferð nakað soleiðis: "Um tað gongur sum ein dunna, ljóðar sum ein dunna og ber seg at sum ein dunna, so er tað ein dunna". Hetta er einfaldur rationalitetur, sum hevur sína nyttu í summum førum. Um vit siga, at ein maður og ein kvinna hava havt samlegu, og eitt egg hjá kvinnuni er vorðið gitið av hesum, er tað tá neyðugt at bíða, til tað sæst á fostrinum, um tað er eitt menniskjabarn, fyri at tað kann fáa menniskja status? Kanska kann einfalda rationaliseringin nýtast her: tvey menniskju eru upphav, tað er eitt menniskja-fostur í eini menniskja-lívmóðir, og at enda verður eitt menniskjabarn føtt: tískil ein menniskja alla tíðina - ella hvussu?

**Dehumaniseringin**

Í samband við fosturtøku royna fólk ofta at koma burtur frá tilvitanini um hetta ólidna menniskjabarn, við at umtala tað sum eitt fostur og føtus - og embryo sum fremmandaorð. Fostur, føtus ella embryo eru medisinsk hugtøk/orð, sum kunnu nýtast í ymiskum førum, men við at nýta hesi hugtøk skapast ein frástøða frá medvitinum um eitt barn í eini lívmóðir inni í eini kvinnu. Tú sært jú ikki eitt barn fyri tær, tá tú sigur fostur ella føtus. Við at nýta orð sum fostur, um eitt barn tíðliga í móðirlívinum, skapa vit kensluliga fjarðstøðu til barnið. Hetta er ein dehumanisering av barninum við hjálp av samheitum ella hugtøkum. Um tú ikki hevur nakað ítøkiligt framman fyri tær, nýtir tú lýsingarorð og hugtøk fyri at lýsa hetta. Tað ber jú ikki til at síggja barnið tíðliga í lívmóðirini. Tá vit so í samband við fosturtøku skulu tosa um hetta barn og lýsa tað, nýta vit ymisk hugtøk, og tað er trupult at síggja eitt barn fyri sær, tá orð sum fostur verða nýtt. Tí er hetta ein dehumanisering av barninum, ið skapar kensluliga fjarðstøðu til barnið - ja kanska eisini eina fremmandagerð av barninum - óivað fyri at kunna tosa rationelt og kensluleyst um fosturtøku og koma til eina objektiva og skilagóða niðurstøðu. Hjá summum er hetta óivað ein ótilvitað dehumanisering. Hetta eru hóast alt ikki óvanlig hugtøk, men hjá summum er tað tilvita, tí at avgerðin um fosturtøku, er ikki ein løtt avgerð at taka fyri nakran. Tá ið tørvur tykist at vera fyri dehumaniserandi hugtøkum fyri at fremja eina fosturtøku, er tíðin tá ikki komin til eina neyva sálarrannsókn og umhugsan hesum viðvíkjandi? Hvussu kanst tú við kensluligari fjarðstøðu taka eina skilagóða avgerð um eina burturav kensluliga støðu? Tí er tað sera týdningarmikið at tosa reiðiliga um fosturtøku og kalla ein spaka, ein spaka; og í hesum føri kalla eitt barn, eitt barn.

Eg vil at enda siga, at eg ikki havi tikið endaliga støðu til hetta mál, men vil bert vísa á álvarsemið í hesum máli, og at skynsemi, kensluligt tilvit og ábyrgd eru betri reiðskap til støðutakan um fosturtøku enn ógreið hugtøk, fyrimunir/vansir spekula-tión og fanatisma, antin tað er fyri ella ímóti fosturtøku.

# Kringvarp Føroya og Náttarrásin

MEINHARD JACOBSEN



Fyri tíð síðani byrjaði Kringvarp Føroya at senda alla náttina – tann sokallaða “Náttarrásin” var til veruleika.

Alt gott um tað, at Kringvarpið fór undir hetta tiltak, ið uttan iva var sakna av nógvum.

Nú tá henda Náttarrásin hevur verið eina tíð, haldið eg at kringvarpið átti at fari eitt stig víðari fram á leið.

Tað er ein sannroynd, at tað í dag eru rættuliga nógv fólk, ið eru til arbeiðis um næturnar. Her hugsi eg serliga um tey, ið taka sær av teimum veiku í samfelagnum, á sjúkrahúsum, ellisheimum og øðrum tílíkum stovnum.

Eisini hugsi eg um øll tey skip, ið fiska á okkara nærleiðum og sum hoyra FM – tey eru sjálvandi í sving allan sólarkringin.

Hesi somu fólk, ið eru til arbeiðis um næturnar, skulu sjálvandi onkuntíð hvíla, og er hetta sjálvandi um dagin, tá fólk flest annars eru til arbeiðis og í skúla.

Við tað at hesi fólk sova um dagin, er tað ein stórur partur at teimum sendingum, ið sendar verða í best senditíð, hesi fólk ikki hoyra.

Eg haldi at Kringvarp Føroya, átti um næturnar at endursent sendingar frá degnum fyri, og soleiðis givið “náttararbeiðarunum” ein líka góðan møguleika fyri at hoyra sendingarnar.

Tíðindasendingin kl. 18 kundi til dømis verði endursend á midnátt.

Hví ikki senda til dømis morgunsendingina kl. 01 og so framvegis.

Við at kringvarpið endursendir egnar sendingar ístaðin fyri tónleik, eru nógvir pengar at spara.

At endursenda um næturnar er væl saktans bert ein spurningur um at programmerað teldurnar.